***Semja á arbeiðsmarknaðinum***

J. nr.: 200500286/13
Komið -2. JAN. 2006
Lagt til: SØS

# Tilmæli

Nevndin, ið sett var at gera tilmæli til skipan fyri trætumál á arbeiðsmarknaðinum, letur við hesum landsstýrismanninum í vinnumálum hjálagda tilfar.

Talan er um tilmæli um sáttmála við viðmerkingum um fastan gerðarrætt, ið skal [redacted] loysa trætur, ósemjur og ivamál á arbeiðsmarknaðinum. Eisini er tilmæli um uppskot um løgtingslóg um mál, ið hoyra undir fasta gerðarrætt. Henda lóg skal heimila politiska myndugleikanum at samstarva við og stuðla fasta gerðarrætti.

Nevndarlimirnir hava regluliga kunnað og hoyrt partarnar á arbeiðsmarknaðinum um tilmælini frá nevndini. Nevndin metur tí, at partarnir fara at taka undir við skipanini. Nevndin vísir tó á, at skipanin er gjørd soleiðis, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum hvør í sínum lagi skulu velja at skriva undir og harvið gerast bundnir av henni, og at sáttmálin kann sigast upp eftir royndartíð uppá trý ár. Neyðugt er tí bæði at tryggja undirtøku fyri skipanini í næstum umframt alsamt at endurnýggja hana.

Nevndin fer, áðrenn sáttmálin ætlandi kemur í gildi 1. apríl 2006, at gera nærri starvsskipan, fíggjarætlan, fyrireika skrivstovu og tryggja aðrar fortreytir.

Komandi ár fer nevndin eisini at evna til uppskot um ábøtur á semingsmannalógina.

Tórshavn 21. desember 2005

Heini Joensen
Durita Tausen

Páll Nielsen
Bjørgfríð Ludvig

Óli Jacobsen
Jógvan Norðbúð

Kári á Rógvi,
formaður